

## Mótmæltu Sarkozy í Dublin

Fleiri hundrað fólk komu í gjár saman í írska høvuðsstaðnum Dublin at mótmæla, at franski forsetin, Nicolas Sarkozy, var komin hagar. Frakland hevur í løtuni formansskapin í ES, og nógvir írar tulka vitjanina hjá franska forsetanum sum eina roynd at leggja trýst á írar fyri at fáa teir at goðtaka Lissabon-sáttmálan, sum írar vrakaðu á fólkaatkvøðu herfyri. Tá Sarkozy kom til stjórnarhúsini at tosa við Brian Cowen, forsætisráðharra, róptu mótmælisfólk "Nei er nei". Sjálvur hevur Sarkozy sagt, at hann ætlar sær ikki at ávirka írar, men at hann ætlar sær at lurta eftir teimum.

# Føroyskir tónleikarar marknaðarførast við FOMX

**Øll norðurlond uttan Føroyar hava ein tónleikavinnuframaskrivstovu, Music Export, ið marknaðarførir tónleik uttanlands. Ein føroyskur arbeiðsbólkur hevur tí seinastu tíðina kanna tørvin fyri einari slíkari skrivstovu í Føroyum, og niður rstøðan varð, at hon í størsta mun er neyðug**



*Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum, fekk í vikuskiftinum handað eitt tilmælið um tónleikavinnuframaskrivstovu í Føroyum, ið ein arbeiðsbólkur mannað av tónleikavinnufólkum hava arbeitt við seinastu tíðina*

TÓNLEIKUR

*Bjørk K. Olsen*
*Bjork@sosialurin.fo*

Tónleikavinnufólk hava seinastu tíðina saman við samvit arbeitt við einum áliti at seta tónleikavinnuframaskrivstovu á stovn í Føroyum. Øll norðurlond uttan Føroyar hava slíka skrivstovu, og tískil varð tilmæli handað landstýriskvinnuni í vinnumálum, Bjørt Samuelsen, á eini ráðstevnu í vikuskiftinum á G!MINI.

### Tónleikavinnuframaskrivstovu setast á stovn

Arbeiðs- og tilvísingarbólkurin handan tilmælið um føroyska tónleikavinnu hevur seinastu tíðina kannað tørvin og møguleikarnar fyri einari føroyskari tónleikavinnuframaskrivstovu. Bólkurin er síðan komin til ta niðurstøðu, at ein FOMX skrivstova skal setast á stovn, og at almenna játtanin fevnir um í minsta lagi trý ár – til vil siga frá 2009 til og við 2011. Tilmælið varð handað landsstýriskvinnuni í vinnumálum í vikuskiftinum.

### Tónleikavinnufólk svaraðu spurnarblaði

Arbeiðs- og tilvísingarbólkurin gav spurnarblað út til fólk innan tónleikavinnuna, har 15 teirra svaraðu. Tá ið svarað var, um ein hevur royndir í at selja ella umboða tónleikir uttanlands, svaraðu øll ja og søgdu seg eisini arbeiða innan nær um allar sjangrur innan tónleik.

### Tónlistafólk arbeiða á ymsan hátt

Tónlistafólkini arbeiða tó við altjóða tónleiki á ymsan hátt. Summi hava samskiftað við altjóðum tónleikavinnum, bókað konsertir, marknaðarført og selt tónleik, meðan onnur hava fingið altjóða tónleikavinnu at taka virknan lut í føroysku tónleikavinnuni. Onkur teirra hava sett eitt tónleikaleiðslufelag á stovní Danmark, meðan onnur hava luttikið á ymsum tónleikatiltøkum og átøkum uttanlands. Har í millum svaraði eisini Jón Tyril, ið er festivalskipari og hevur tískil fingið útlendskar bólkar til Føroyar eisini.

### Føroyskur tónleikur ikki kendur uttanlands

Tá spurt verður, hvussu føroyskur tónleikur stendur seg í altjóða høpi, er niðurstøðan, at hóast einstakir bólkar hava megnað seg uttanlands, er føroyskur tónleikur sum heild ikki kendur.

### Stuðulskipan

Tá spurt verður, hvørjar ábøtur eiga at verða gjørdar í samband við stuðulsskipanir, kemur arbeiðs- og tilvísingarbólkurin til hesa niðurstøðu: Tað er torført at menna ein føroyskan tónleikara til ein altjóða tónleikara. Týdningarmikið at tónleikavinnufólk eru við í verkætlanum. Vantandi stuðul til ferðin. Skilagóð fíggjarstýring, meira PR arbeiði og framførslur. Lække gjaldið til atgongumerki í Føroyum.

### Vinnumálaráðið tekur álitið til viðgerðar

Bjørt Samuelsen, landstýriskvinna í vinnumálum, eru beint nú í feriu, men sigur, at hon fer at taka álitið til viðgerðar.

- Eg eri sera jalig um hetta álitið, og tað sær ótrúliga áhugavert út, sigur landsstýriskvinnan. Vinnumálaráðið ætlar at taka álitið við í viðgerðini av fíggjarlógini fyri 2009, og tískil skuldi støða verið tikin í málinum um heystið í ár.

### Felags fígging

- Eg havi ímyndað mær, at bæði tað privata og almenna skal fíggja skrivstovuna. Føroyskar fyritøkur kunnu eisini nýta tónleikin at marknaðarføra seg uttanlands, og tískil hevði tað borið til at havt felags fígging, sigur Bjørt Samuelsen, landstýriskvinna í vinnumálum.

Tey, ið svaraðu spurnarbløðum frá Arbeiðs- og tilvísingarbólkinum. Øll starvast onkursvegna innan tónleikavinnuni bæði í Føroyum og uttanlands:

Kristian Blak
Jón Tyril
Sigvør Laksá
Christian Ulf Hansen
Gisli Von Ice
Klaus-ib Jørgensen
Ólavur Jacobsen
Jens L. Thomsen
Fróði Vestergaard
Christian H. Buhl
Linda Mortansdóttir
Hergeir Eldevig
Jonhard Eliasen
Gunvør Balle

**Niðanfyri nevnda virksemi er í høvuðsheitum tað, ið føroyska tónleikavinnan metir, at ein koman FOMX skrivstova skal taka sær av, stendur í álitinum, ið er handað Bjørt Samuelsen, landstýriskvinnuni.**

- **Skapa eina sterka, langskygda og málrættaða heildarætlan fyri útflutningi av tónleiki.**
- **Fremja samstarv, veita ráðgeving, kunning og byggja upp ein vitanardepil fyri tónlistafólk og bólkar í Føroyum**
- **Samskipa førleikamennandi virksemi fyri føroysku tónleikavinnuna.**
- **Samstarva við føroyska sýnisgluggapallin í Føroyum (dømi: AME og G! Festival)**
- **Seta í verk samtøk við privata vinnulívið, eisini tvørtur um vinnugreinir.**
- **Samskipa altjóða tiltøk og átøk innan tónleikavinnu í Føroyum og uttanlands.**
- **Byggja brýr millum føroyksa og altjóða tónleikavinnu og viðlíkahalda sambond.**
- **Stuðla og veita PR til tónlistafólk og bólkar.**
- **Umboða føroyskan tónleik uttanlands.**



*Teitur Lassen er ein av fáum føroyskum tónleikarum, ið hevur megnað seg í altjóðum høpi. Ætlanin við tónleikavinnuframaskrivstovuni er at hjálpa føroyskum tónleikarum ávegis í útheimin*